## Páll á Reynatúgvu var gegnigur



Páll á Reynatúgvu var gegnigur, tá hann varð við at seta konu sína í starv á Barnaverndartænastuni á Sandi. Tað sigur niðurstøða hjá Almannamálaráðnum. Áðrenn Páll á Reynatúgvu legði frá sær sum borgarstjóri á Sandi vóru ymiskar kanningar settar í verk at kanna gegni hjá borgarstjóranum í trimum ymsum málum. Viðvíkjandi lønini hjá borgarstjóranum, sum borgarstjórin var við at avgera, metti Innlendismálaráðið, at Páll á Reynatúgvu var gegnigur. Viðvíkjandi játtanini til tilhaldi á Sandi, sum hevur ávirkan á inntøkuna hjá Reynatúgvu-familjuni, dró niðurstøðan hjá Innlendismálaráðnum á bæði borð. Nú er niðurstøðan um seinasta og álvarligasta máli - sum var um starvssetanina hjá Kristinu á Reynatúgvu í barnaverndartænastuni – komin. Almannamálaráðið sigur soleiðis í síni niðurstøðu. Sambært grein 3, stk. 1, nr. 2 í fyrisitingarlógini var Páll á Reynatúgvu gegnigur í málinum um setan av leiðara fyri Sandoyar Barnaverndartænastu. Við tað, at Páll á Reynatúgvu: ikki hevur tikið avgerð í málinum, als ikki møtti til fundin 6. mars 2009, tá setanarsamrøður vóru og avgerð varð tikin um setan av leiðara, og at samstarvsnevndin í hvørjum einstakum føri, hevur tikið avgerð við vanligum meiriluta. Tí metir Almannamálaráðið ikki, út frá teimum fyriliggjandi skjølum í málinum, at nakað óregluligt er farið fram í sambandi við setanina av leiðara fyri Sandoyar Barnaverndartænastu.

# Høvundur rørdur til tár

**Egon Hansen var so rørdur við framløgiuna av bókunum »Nólsoy – søgubrot og fólk 1 og 2« – at hann hevði ilt við at halda tárunum aftur. Óvæntað stóra uppmøtingin var helst orsøkin**

BÓKAFRAMLØGA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tíðin upp undir jól er nærum á hvørjum ári merkt av bókaútgávum av øllum handaslag. Í ár er einki undantak.

Í gjár varð so framløga av bókunum »Nólsoy – søgubrot og fólk 1 og 2«, sum Egon Hansen hevur skrivað.

Egon Hansen hevur líka frá tí hann var so frægur verið mettur sum fróðarmaður, og hevur heilt frá barnsbeini havt sera stóran áhuga fyri søgu og siðum. Hann hevur soleiðis gjøgnum mong ár latið siðsøguligt tilfar til tíðarritið Varðin, og fyri nøkrum árum síðani lat hann bókina »Kirkjan á tanganum« úr hondum, sum kirkjuráðið í Nólsoy gav út.

Tað er einki at ivast í, at útgávan »Nólsoy – søgubrot og fólk« er nógv størsta og virðismiklasta frambrotið úr hansara hondum, samstundis sum hann við hesum hevjar seg upp á støði við viðurkend mentafólk úr bygdini sum Johannu Mariu Skylv, Mariu Ejde, Poul Nolsøe (á Mýruni) og kanska tann allarstørsta av øllum, Nólsoyar Páll.

Í røðu síni á framløguni segði Egon Hansen, at tað hevði tikið honum 30 ár at skriva hesar báðar bøkurnar.

- Tað var á ungum árum, at eg fór undir at savna søguligt tilfar um heimbygdina Nólsoy. Sum tíðin er liðin er hetta tilfar vorðið so mikið í vavi, at eg helt, at søgustubbasrnir, sum í fleiri ár hava verið at sæð í tíðarritinum Varðin og aðrir stubbar, loksins eru búnir til útgávu, segði Egon Hansen.



*Egon Hansen nýtti høvið at handa Tórshavnar býráð eintøk av bókunum, sum Heðin Mortensen, borgarstjóri, tók ímóti*



*Egon Hansen signeraði bøkur, og rættiliga nógv fólk nýttu høvið at keypa, eisini fólk, ið ikki hava nakað við Nólsoy at gera sum so. Her signerar Egon eitt sett til Poul Johannus Johannesen, fyrrverandi lærara, úr Gjógv, meðan konan, Katrina fylgir við*



*Óvæntað nógv fólk vóru komin til framløguna, og verri enn so øll fingu sess í Posthúskjallaranum*



*Systkinini hjá Egon, Tove Johannesen (til vinstru) og Sune Hansen, saman við konuni Unu, vóru sjálvandi eisini til staðar. Millum tey bæði systkinini situr Maria Nicolajsen úr Vestmanna, sum er mostir teirra*

### Sera nógv fólk

Sum altíð, tá serliga bøkur av slíkum slag verða skrivaðar, so er tað ikki bara høvundurin sjálvur, sum má skipa sín dag, men eisini tey nærmastu, fólk, sum á einhvønn rætta eina hond og hjálpa til. Og soleiðis hevur eisini verið í skrivingini hjá Egon Hansen.

Og hann nýtti eisini høvið at takka teimum, sum hava havt týdning í sambandi við framleiðsluna av hesum bókunum.

Eg takki hjartaliga øllum teimum mongu, eg havi vent mær til um upplýsingar, segði Egon Hansen.

Og síðani nevndi hann Martin Tórgarð fyri tilfar hjá pápa hansara, Sigmund í Geilini, Kristin Holm, sála, fyri dagbókina hjá Petur Jákup Petersen, keypmanni, Eilif Brimheim fyri myndahjálp og so sjálvandi konuni, Katrinu, fyri tolsemi tey árini, hann hevur arbeitt við bókunum.

Og tað ikki uttan klumpar í hálsinum, at høvundurin bar fram sína tøkk, ikki minst tá hann nevndi javnaldra sín, Kristin Holm, sum alt ov tíðliga var rivin burtur. Men hann var uttan iva eisini ovfarin av teirri sera stóru mannfjøld, sum var møtt upp til hesa framløguna. Bæði fráfluttir og tilfluttir nólsoyingar, umframt sjálvandi fastbúgvandi.

Bøkurnar eru býttar í tveir partar. Fyrri partur snýr seg um bygdarlívið og gerandisdagin í Nólsoy, meðan seinni partur er um ættarsøgu nólsoyinga seinastu tríhundrað árini.



*Egon Hansen takkaði í røðu síni Martin Tórgarð (til vinstru) og Eilif Brimheim (til høgru) fyri teirra hjálp við bókunum. Millum teir báðar situr Andrias Reinert*